# Málturkur á Toftum

**Væl upplagda HB skal vitja á Svangaskarði, har teir hava sera ilt við at vinna málið hjá mótstøðuliðunum**

B68–HB
*Jóannes Hansen*



*Andrew av Fløtum fekk trý mál í sínum seinasta dysti, sum var móti VB. Toftamenn skulu hinvegin reisa seg eftir lemjandi tapið móti FS Vágum*

Tey fyrstu fimm umførini var gongdin hjá B68 og HB ikki so ólík. Bæði liðini fingu góða úrtøku. Síðsta vikuskifti vísti pílurin hvønn sín veg. HB fekk fult í Vági, har teir ikki høvdu fingið so góða úrtøku síðani 1991. B68 fekk einki á heimavølli ímóti FS Vágum, sum frammanundan hevði tapt allar fimm ferðirnar, sum teir høvdu verið á Svangaskarði.

Tølini siga, at higartil hevur einki verið at finnast at verjuspælinum hjá B68. Færri mál eru farin ígjøgnum hjá Alberti Sævarsson, enn tað eru farin ígjøgnum hjá nøkrum øðrum málverja. Hesa ferð er Hans Fróði Hansen, sum seinastu vikurnar hevur verið sera sannførandi, leikbannaður, og tískil verður neyðugt við broytingum í miðverjuni.

Tað er illa statt við álopspartinum hjá B68. Í seks royndum hava teir bara fingið fimm mál. Eina ferð hava teir skorað upp á brotsspark, og tvær ferðir hava mótstøðumenninir átt síðsta fótin á. Tað vil siga, at B68 menninir, sum plaga at skjóta nógv mál, higartil í ár bara hava fingið tvey mál í gásareygum vanligum spæli, og tey eru bæði skorað eftir hornaspark.

Einki er frætt um, at B68 hevur nakran jokara at seta í álopið. Einasti nýggi maðurin hesa ferð er gamal kenningur. Jákup Eli Olsen hevur búð uttanlands síðsta árið, men nú er hann fluttur aftur til Føroya, og hann verður í fjúrtan manna liðnum hjá B68 í morgin.

### Jón Rói saman við vinmonnunum

Hjá HB stendur heilt væl til. Bæði á støðutalvuni, har teir eru fremstir, og hvat fólki viðvíkur. At teir hava nógv at vela ímillum sæst aftur í, at tað ikki tykist hava gjørt mun, at Jan C. Dam, Kári Nielsen og Nicu Dogaru, ið allir vóru fastir menn fyrsta partin av kappingarárinum, framvegis eru skaddir. Kári verður ikki við fyrrenn eftir summarsteðgin. Nicu hevur trupulleikar við knænum. Hann hevur vant eitt sindur, men enn er óvist, hvussu tað verður við honum. Jan venur við fullari ferð, men teir rokna ikki við, at hann verður við á Toftum.

Fyrr í vikuni sást Jón Rói Jacobsen, sum er heima í stuttari summarfrí, venja saman við gomlu liðfeløgunum. Hetta setti beinanvegin ferð í søguna um, at hann fer at spæla við vinmonnunum ímóti B68. Men tað fer hann sambært okkara HB keldu ikki. Todi Jónsson og Jákup Mikkelsen royndu í onkrari av fyrstu summarfrítíðunum, eftir at teir vóru farnir úr Klaksvík, at hjálpa KÍ, men tað hilnaðist einki serligt, og hjá Jón Róa er tað ivaleyst best at kobla frá, soleiðis at hann verður hundrað prosent um tvær vikur.

# Leita eftir rætta hýrinum

**Klaksvíkingar ásanna, at tað eftir avhølvingina í Gundadali verður torført ímóti FS Vágum, sum tað gongur rætta vegin hjá**

KÍ–FS VÁGAR
*Jóannes Hansen*

Í Klaksvík hava tey ilt við at finna rætta fótbóltshýrin, eftir at flaggskipið hjá teimum sunnudagin legði rygg til 7–1 tap ímóti B36 í Gundadali. Higartil í ár hevur tað hilnast betri á útivølli, enn tað hevur gjørt á heimavølli, har tað í tveimum roydum ikki hevur eydnast at fingið fult. KÍ plagar annars at eiga stóran og tryggan skansa í Klaksvík, men í løtuni er tað rættuliga ivasamt, hvussu tað er við hesum.

– Vit royna at vaska talvuna reina, og sunnudagurin fer at vísa, hvussu tað hevur eydnast. Men tað er ikki bara sum at siga tað at koma í rætta hýrin, eftir at tað hevur gingið, sum tað gekk ímóti B36, siga teir í Klaksvík.

Liðformaðurin hjá KÍ, Allan Joensen, hevur ikki vant nógv í síðstuni, tí hann hevur verið skaðaplágaður. Men í hesi vikuni hevur hann aftur verið og vant, og teir vóna, at hann verður klárur í morgin. Jan Andreasen var burturfrá í tríggjar vikur. Hann kom inn av beinkinum í Gundadali ímóti B36, og hann hevur vant við í hesi vikuni.

Alexander Djordjevic hevur verið sera ódrúgvur higartil í ár, og hann er framvegis so mikið skaddur, at hann ikki fer at spæla ímóti FS Vágum. John Ryan, sum annars bara hevur hugnað sær í 2. deild, hevur tær síðstu vikurnar vant við fullari ferð. Hann spældi seinna hálvleik á Skála, men hann var ikki við ímóti B36. Um hann verður við í morgin var ikki greitt, tá ið vit høvdu samband við Klaksvík. Nú eru trý ár síðani, at John Ryan, sum er 29 ára gamal, síðst var rættuliga í fremstu røð.

Klaksvíkingar rokna FS Vágar sum sera torført mótstøðulið. Men teir siga seg ikki kenna nakað serligt til mótstøðuliðið, sum teir ikki hava spælt ímóti og sæð higartil í ár.

### Lagið er gott

Í Vágum er fótbóltsfepurin rættuliga farin at gera um seg. Hetta fyrsta fótbóltsárið eftir at teir hava fingið fast samband, eru teir farnir at skipa fyri bussferðum til í sambandi við útidystirnar, og heimafylgjan hevur ikki verið so lítil.

Sama fólkið verður við FS Vágum, sum var við til at vinna fyrsta sigurin nakrantíð á Svangaskarði. Tá var Eyðfinn Fjalsbak, sum legði so bragdliga fyri í vár, ikki við. Hann er skaðaplágaður og er farin til skips. Teir rokna við, at hann verður við aftur eftir summarsteðgin.

Tað hevur ljóðað, at FS Vágar skal fáa ein álopsspælara afturat. Talan er um stóran og sterkan brasiliumann. Hann var á veg henda vegin fyri tveimum vikum síðani, men tá varð hann sendur til hús aftur úr Portugal, tí pappírini skuldu ikki vera í lagi.

**Støðan, 1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | mál | vunnin mál | tapt munur | málstig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 18 | 7 | 11 | 14 |
| 2 NSÍ | 7 | 3 | - | 4 | - | 0 | 14 | 6 | 6 | 13 |
| 3 GÍ | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 12 | 10 | 2 | 11 |
| 4 KÍ | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 7 | 9 | -2 | 11 |
| 5 B36 | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 13 | 6 | 7 | 10 |
| 6 B68 | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 5 | 4 | 1 | 9 |
| 7 EB/Streymur | 7 | 2 | - | 3 | - | 2 | 11 | 13 | -2 | 9 |
| 8 FS V | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 8 | 12 | -4 | 7 |
| 9 VB | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 6 | 15 | -9 | 2 |
| 10 Skála | 7 | 0 | - | 0 | - | 7 | 2 | 14 | -12 | 0 |

# Startrøðin til FM-róðurin á jóansøku, 28. juni 2003

**Leygardagin 28. juni fara 48 bátsmanningar at rógva fjórða FM-róðurin, ið hesa ferð verður á jóansøku á Tvøroyri. Startrøðin verður henda:**

**Fimmmannafør, dreingir**

1 Kollur
2 Royndin Fríða
3 Tjaldrið
4 Havfrúgvin
5 Sílið
6 Blikur
7 Fípan Fagra 1G
8 Junkarin
9 Báran

**Seksmannafør, kvinnur**

1 Fortuna
2 Lómur 1G
3 Jarnbardur 1G
4 Gongurólvur 1G
5 Páll Fangi 1G
6 Fuglfirðingur 1G
7 Smyril 1G

**Fimmmannafør, gentur**

1 Hulda
2 Ørnin
3 Firvaldur
4 Drekin
5 Havfrúgvin 1G
6 Blikur 2G
7 Sílið 1G
8 Fípan Fagra
9 Junkarin
10 Kollur
11 Tjaldrið

**Seksmannafør, menn**

1 Hvessingur
2 Kollfirðingur
3 Sølmundur
4 Sundabáturin
5 Páll Fangi
6 Jarnbardur 1G
7 Smyril
8 Strálan
9 Gongurólvur
10 Lómur
11 Riddarin
12 Snopprikkur

**Áttamannafør**

1 Kvívíkingur
2 Argjabáturin
3 Ørvur
4 Knørrur 1G
5 Teistin

**Tíggjumannafør**

1 Havnarbáturin
2 Nólsoyingurin
3 Eysturoyingur
4 Vestmenningur



# Heimaftur við gulli og silvuri

**Mánadagin kemur føroyska liðið heimaftur av Special Olympics World Summer Games 2003. Tey 10 ítróttarfólkini koma ikki tómhent heimaftur, men hava gjørt Føroyum heiður við at vinna bæði gull og silvur. Tað ætla ÍSB og Javni ikki skal fara stillisliga aftur við borðinum, men skipa fyri móttøku, bæði á flogvøllinum og í ÍSB-húsinum**

SPECIAL OLYMPICS
*Rúna Sivertsen*



*Tað verður sanniliga rómur, tá føroyska OL-liðið kemur heimaftur mánadagin úr Írlandi. Liðið megnaði at vinna bæði gull og silvur á Special Olympics World Summer Games 2003. Myndin er tikin á flogvøllinum beint undan fráferðini tann 16. juni*

*(Mynd: Edvard Joensen)*

Í skrivandi løtu er ikki greitt, hvussu endaliga úrslitið hjá teimum 10 ítróttarfólkunum verður, sum hava verið við á Special Olympics leikunum í Írlandi.

Men ikki koma tey heimaftur sum av torvheiðum, tí Durita Strøm hevur vunnið tvey gullheiðursmerki í svimjing, og Unn og Júst hava vunnið silvur í borðtennis.

OL-liðið kemur heimaftur mánadagin seinnapartin við flogfarinum og lenda í Vágunum um fýratíðina.

Tá fara foreldur og avvarðandi, ÍSB og Javni at skipa fyri móttøku við fløggum og bannarum. Eisisni fara tey at syngja, "We are the champions".

Síðani verður farið til Havnar við bussi,. Á Farstøðini verða tey heintaði og koyrd niðan í ÍSB- húsið, har M'as Blues Band og Ælabogin fara at spæla og syngja saman við avvarðandi.

Ein sangur er yrktur til heimkomuna. Egga frá ÍSB fer at halda røðu, og rósur verða handaðar liðnum. Eisini verður smyrjibreyð og cider at fáa, siga fyriskipararnir og bjóða øllum at verða hjartaliga vælkomin til hesa stóru løtu.

# Eftirlýsa føroyskar bakmenn

**Løgreglan kannar, hvør í Føroyum var sambandið hjá tí 28 ára gamla dananum, sum varð tikin við 20 kilo av hassji mánadagin. Maðurin er varðhaldsfongslaður í fýra vikur, meðan kanningar fara fram**

RÚSEVNI
*Ingi Rasmussen*

Tollvaldið gjørdi eitt ordans hál á Norrønu mánadagin. Ein 28 ára gamal dani varð kannaður ávegis í land, og tað vísti seg, at hann hevði smá 20 kilo av hassji í taskuni.

Í grundlógaravhoyringini varð hann varðhaldsfongslaður í fýra vikur, meðan løgreglan kannar málið. Tvær tær fyrstu vikurnar skal hann sita avbyrgdur, so hann ikki fær órógva kanningararbeiðið hjá løgregluni.

Løgreglan er í ferð við at finna útav, hvønn maðurin hevði samband við í Føroyum, tí tað er eyðsæð, at hann ikki er einsamallur um so stórar nøgdir. Løgreglan eftirlýsir føroyska sambandið, og hevur nakar eina upplýsing, eru fólk vælkomin at siga frá.

Hassjið hevði eitt virði á hálva triðju millión krónur, og tá so stórar nøgdir koma í einum, er tað eitt tekin um, at nýggir menn royna at etablera seg á rúsevnismarknaðinum. Fleiri bakmenn vóru settir fastir eftir stóra rúsevnismálið, og tað hevur givið pláss fyri øðrum.

Sum skilst er tann 28 ára gamli danin ikki ein kenningur hjá løgregluni frammanundan. Hann kann kortini vænta sær áralangan dóm, tí talan er um so stóra nøgd, sum ongantíð er funnin á føroyskari jørð áður.



*Fongurin var stórur, tá Norrøna mánadagin kom til landið*